**TIL SØLU**
19" SAMTRON skermur til sølu kr 1500,-
*Tlf. 271982*

**TIL SØLU**
ISDN Moden 350 kr. Telduspøl: FIFA 2001 150 kr. FIFA 2002 150 kr. Total Club Manager 2003 150 kr.
*Tlf. 222610*

## Tónleikur

**GAMALT TRAKKIORGUL**
Bíliga til sølu.
*Tlf. 311415*

**STEEL GUITARI**
Steel gittari við pedalum og knæbendarum til sølu.
*Tlf. 75 52 51*

**EIN SUPER MULTI DVD REWRITER**
DVD 8x4x2x3x12, CD 24x16x32x til sølu fri 550 kr.
*Tlf. 260106*

**PLÁTUSPÆLARI**
Thorens plátuspælari sera bíliga til sølu.
*Tlf. 448310*

**GUITARFORSTERKARI TIL SØLU**
VOC AC 15 rørforsterkari við Celestion BLUE hátalara kr. 5.000
*Tlf. 421419*

**GUITARI TIL SØLU**
PRS SE við P-90 mikrifonum (Les Paul model)
*Tlf. 421419*

**TIL SØLU**
Cervin vega subar 800 watt, fyri 10.000 kr.
*Tlf. 255569*

**TIL SØLU**
E-V frontur 600 watt, subar og tobbar, lítið brúkt, til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 255569*

**KLAVER TIL SØLU**
Eitt lítið brúkt Wurlitzer klaver til sølu.
*Tlf. 310404/510404*

**ROLAND KEYBOARD**
c. 180, 2 ára gamalt, nýprísur 8.000,- selist fyri 5.000 kr.
*Tlf. 444534*

**MEGAKRAFTIGUR BASSHÁTALARI**
Til bilanlegg til sølu fyri kvartan prís. Hann er nóg illa tilkoyrdur. Merki er JBL
*Tlf. 503074*

**STEREOANLEGG**
Við plátuspælara bíliga til sølu.
*Tlf. 503074*

## Út- & Sjónvarp

**SONY FALT-TV**
17'' Sony Widescreen flatskermur til sølu fyri 6.500 kr. Nýprísur 13.-14.000 kr. 15 mán. garanti. Vakurt design, góð myndagóðska.
*Rlf. 310174 ella 210174*

## Ymiskt

**VINDEYGA TIL SØLU**
Plastvindeyga 198x145, sum nýtt, bíliga til sølu.
*Tlf. 441309*

**TIL SØLU**
2 Flymo sláimaskinur bíliga til sølu.
*Tlf. 210174 ella 310174*

**EFTIRLÝSING**
FK-rabatmerkini frá 60- og 70árunum. Er tað nakar sum eigur nøkur av hesum at lata ella selja.
*Tlf. 321291*

**INNHURÐAR TIL SØLU**
10 innhurðar til sølu.
*Tlf. 216616*

**HEY**
Er tað nakar sum hevur 2 ella 3 atgongumerkir til Fólk og dólgar at selja mær? Ring
*Tlf. 257983*

**APEX FERÐASEÐIL**
1 Apex ferðaseðil á rutinum hjá Atlantic Aiweays til sølu fyri 2.800 kr. Vanligur prísur 3.100 kr. Ring
*Tlf. 226418 eftir kl. 15.00*

**VÁGS PENSIONISTAFELAG**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsa tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlomunum

**YNSKIST**
Hvít wc-kumma og hvítt baðikar v/ tilhoyr.
*Tlf. 210336*

**EIGUR NAKAR**
2 atgongumerkir til fólk og dólgar at selja mær, so vinarliga ring
*tlf. 748317*

**TIL SØLU**
Antik el-seymimaskina Pfaff-minor.
*Tlf. 316440/253440*

**FØSTULÁVINTSVEITSLA**
og tunnusláttur verður leygardagin 4. februar. Tekningarlistin til veitsluna og tunnusláing liggur á Ólafløtti til tórsdagin 3. feb. kl. 18.00. Gott skemt verður á veitsluni, Sólva og Bergmenn spæla til dansin aftaná.
*Føstulávintsnevndin í Sumba*

**TIL SØLU**
4 termorútar til sølu. Mát: 197,6 x 173,6 x 2,2 cmPrísur 500,- kr.
*Tlf. 215698*

**SEYÐAHUNDAKAPPING Á VIÐAREIÐI**
5. februar 2005. Kappingin verður í klassa 1, klassa 2 og klassa 3. Í hesum sambandi hevur Hotel Norð eisini tilboð í samband við gisting. Síðsta freist at tekna seg er mikudagin 2. februar. Áhugað kunnu ringja á tlf. 756787 ímillum kl. 17 og 22. Gisting á Hotel Norð tlf. 451244 ella 217020.
*Tlf. 451244/217020*

**ÆTLA TIT AT FLYTA TIL DK?**
Vit fara til Danmarkar við flytigóðsi ca 20. februar. Ring og fá eitt gott tilboð.
*Vest-Trans tlf. 227050 fax. 317051*

**VIDEOKAMERA**
Sony mini-dv handycam til sølu fyri kr. 3.000,- 3 mðr. gamalt.
*Tlf. 317034*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 vindeygu b. 140 x 100 og b. 140 x 130 til sølu fyri 500 kr. stk. – termorútar.
*Tlf. 227853*

**BILANLEGG**
2 sett hátalarar, 1 sett á 250 w og 1 sett á 150 w og ein forsterkari, alt er Pioneer til sølu fyri 3.000,-
*Tlf. 256944 ella 448340*

**BILANLEGG TIL SØLU**
Pioneer Deh-P6500 við livandi myndum á skerminum og trimum forsterkara útgangum til sølu fyri 3000 kr. Nærum óbrúkt.
*Tlf. 213067*

**TRAPPA YNSKIST**
Innandurða trappa ynskist. H. 240 cm.
*Tlf. 457178 ella 222640*

**AMATØR-RADIO ÚTGERÐ**
Sommerkamp SSB Transceiver FT 250, BW Antenna Tuner Model VS 300 A, DAIWA Elecronic Keyer, hátalari, SWR-meter model TTS, tvey skeiðhefti + morsubond til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 441893*

**HJÁLHESTAHJÁLMAR**
Tveir súkkluhjálmar (Atlas og Winther) til sølu fyri 100 kr. fyri hvønn
*Tlf. 441893*

**FLAMINGUPLÁTUR**
ÁTTA FLAMINGIOPLÁTUR (3000X1000X50) MM3. Vælegnaðar til flótandi gólv, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 441893*

**KASSATÓL**
Casio, lítið nýtt, prísuppskot: 5.000 kr.
*Tlf. 333014 ella 226161*

**HEY HEY!**
Nú fer at nærkast: Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-skótarnir í Kvívík*

# Føstulávintstiltak í SMS




**Leygardagin 5. februar verður stórt føstulávintstiltak í SMS, har m.a. heimskendi danski leikbólkurin „H.C. Andersen Paradan" fer at framføra ævintýrleikir eftir H.C. Andersen**

FØSTULÁVINTSHALD
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 5. februar eru allar grýlur - bæði lítlar og stórar - vælkomnar í SMS til ein stuttligan dag. Eins og undanfarin ár, skipar SMS fyri stórum og forvitnisligum føstulávintstiltaki á Torginum og í húsinum annars og handlarnir í SMS fara at hava góð tilboð henda dagin. Sí og hoyr meira í SMS-varpinum eftir Dag & Viku fríggjakvøldið. Frá kl. 10.00 bjóðar SMS børnunum góðgæti frá Damfar og Pop Top frá MBM.

Høvuðsnavnið á tiltakinum er heimskendi danski leikbólkurin "H.C. Andersen Paradan", ið framførir ævintýrleikir eftir H.C. Andersen. Tiltakið er komið í lag í samstarvi við Klaksvíkar býráð, ið er vinarbýur við føðibýin hjá H. C. Andersen - Odense. Í ár eru 2005 ár liðin síðani H. C. Andersen varð borðin í heim. Tí verður nógv gjørt burturúr, serliga í Danmark og Odense, men eisini úti í heimi.

H. C. Andersen Paradan er víðagitin ungdóms teaturbólkur, ið hevur havt framførslur í m.a. Kina, Hollandi, Belgiu, Týsklandi og Onglandi, umframt í Danmark. Tey framføra á enskum, týskum og donskum máli. Íklødd prýðiligar búnar, ið stava frá ævintýrunum, hava tey sermerkt seg við gjøgnumførdari skrá og hegnisligari samanseting úr flestu ævintýrunum eftir H. C. Andersen. Tónleikurin gevur eisini framførsluni rættan ævintýrdám.

Við í "H. C. Andersen Paraduni" eru 15 ungdómar umframt høvuðspersónin H. C. Andersen, alias Torben Iversen, ið greiðir frá og er bindiliðið millum teir ymisku leikirnar.

Beint eftir framførsluna hjá H.C. Andersen Paraduni, kunnu børnini gera bomm saman við Hannibal og systkinabarni hansara á Torginum. Hannbal hevur hevur greitt okkum frá, at tey fara at gera fýra sløg av bommum, nevnliga við jarðberja-, vanilju-, ananas- og hindberjasmakki. Børnini sleppa sjálvi at gera bommini, klippa tey og pakka tey í posar, sum tey síðan kunnu taka við sær heim.

Kl. 13.00 verður tunnusláttur fyri børn upp til 13 ár. Tey smærru børnini, upp til 6 ár, sláa eina lítla tunnu, meðan tey eldru - frá 7 til 13 ár - sláa eina størri. Kattakongarnir fáa vinningar.

Av tí at tað er føstulávint, fara vit eisini at heiðra vakrastu grýlunum, og tað ræður um at nýta hugflogið, tí vakrastu grýlurnar fáa góðar vinningar frá SMS. Vakrastu grýlurnar verða kosnar kl. 14.00. Harumframt verður vakrasta starvsfólkagrýlan kosin, og til tað hevur SMS brúk fyri tykkara hjálp, tí tað eru tey vitjandi í SMS leygardagin, ið gera av, hvør starvsfólkagrýla er vakrast. Atkvøðuseðlar eru at fáa í Viku-Blaðnum týsdagin 1. februar ella á Torginum leygardagin. Øll, ið atkvøða um bestu starvsfólkagrýluna, eru við í lutakastinum um ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

SMS heilsar øllum og boðar frá, at vit gleða okkum at síggja tykkum í SMS leygardagin 5. februar. - eisini tykkum, ið ikki eru grýluklødd.

# Fyrilestur á Glyvrum um nærveru

FYRILESTUR
*tíðindaskriv*

Mikukvøldið 2. februar kl. 19.00 verður fyrilestur í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum. Tað er Jógvan Fríðrikson prestur av Gjaranesi, sum heldur almennan fyrilestur um nærveru.

Fyrilesturin er liður í eini røð av smærri tiltøkum, sum Kongshavnar Kvinnufelag javnan skipar fyri. Seinastu tíðina hevur Kongshavnar Kvinnufelag skipað fyri millum annað fyrilestrum um siðamisbrot, diabetikarar, orð, ið menna, lit- og kostráðgeving, urtagarðsrøkt, sjálvsmenning osfr.

Fyrilesturin er ókeypis og Kvinnufelagið bjóðar ein drekkamunn undir tiltakinum.

